Fleiri rásir - einki roks

Á 3+ mánakvøldið kl. 20.00

# Tað verður ikki frægari



Cuba Gooding Jr. og Greg Kinnear (granni Melvins, Simon)



Jack Nicholson og Helen Hunt fingu bæði hvør sína oskar fyri leiklut teirra í hesum romantiska skemtifilminum

Ein rørandi og romantiskur skemtifilmur, har bæði Helen Hunt og Jack Nicholson vunnu hvør sína Oskar.

Melvin Udall (Jack Nicholson) er ein av teimum heilt løgnu. Hann arbeiðir dagliga heima í íbúð síni á Manhattan. Her roynir hann at gera tað síðsta, ið manglar av síni seinastu bittur-søtu skaldsøgu. Restina av orku síni brúkar hann til at irritera næstar sínar og onnur fólk. Hann velir sær nøkur tilvildarlig offur, og hann smæðist ikki við at rópa og skeldast. Serliga er tað samkyndi granni hansara, Simon (Greg Kinnear), ið hevur fleiri trupulleikar av Melvin.



Jack Nicholson verður noyddur at seta seg inn í lívið og kenslurnar hjá øðrum menniskjum

Melvin hevur sínar føstu rutinur og ritualir, og teimum fylgir hann neyvt. Dagurin byrjar við, at hann fær sær morgunmat á kaffistovuni í grannalagnum. Her hevur hann fast borð og við sær tekur hann egnan gaffil og knív. Eisini her hevur hann stygt øll starvsfólkini burtur frá sær — tó, líka undantikið Carol Connelly (Helen Hunt). Hon arbeiðir nógv og er eina mamma at einum dreingi, ið líðir av álvarsamari astma-sjúku. Carol hevur nóg mikið at stríðast fyri í sínum lívi, so hon letur seg ikki sára av einari ella tveimum sarkastiskum viðmerkingum frá Melvin. Í samveru síni við Carol verður Melvin noyddur at seta seg inn í lívið og kenslurnar hjá øðrum menniskjum. Hetta er ein heldur ræðandi umgangur hjá Melvin, ið ikki hevur serliga góðar sosialar antennur og veit í roynd og veru ikki, hvussu hann skal uppføra seg...

# Idols

Á TV3 týskvøldið kl. 19.00

Hyggjararnir og dómararnir vóru samdir um at Søren, Simon og Theis skulu til finaluna í Idols.

Týsdagin í hesi vikuni vórðu tríggir mannligir finalistar funnir í Idols á TV3. Níggju dreingir kappaðust um trý finalupláss við at framføra ein sang frammanfyri dómarunum, Thomas Blachman, Anders Hansen og Susanne Kier — og so sjálvsagt eisini hyggjararunum, sum í síðsta enda avgera dómin. Nú eru sostatt seks av átta finalistum funnir í Idols, eftir at hyggjararnir útvaldu tríggjar gentur í fyrru viku.



Hyggjararnir valdu Simon, Theis og Søren. Fyrsta finaluumfarið verður týskvødið 12. oktober



Thomas Blachman, Anders Hansen og Susanne Kier eru kontantu dómararnir í Idols 2004



Teir fyrstu finalistarnir í Idols 2004 gjørdust Nadia, Louise og Rikke

Áðrenn endaliga dómin, og eftir at luttakararnir høvdu gjørt seg so nógv upp sum teir kundu, fingu dómararnir høvið at siga sína meining um hvønn hyggjararnir skulu atkvøða fyri. Teir peikaðu á fýra favorittar, meðan hyggjararnir valdu tríggjar av hesum — 22 ára gamla Søren Fruergaard úr Frederiksberg, 16 ára gamla Simon Søndergaard úr Uldum og tann 25 ára gamla Theis Andersen úr Keypmannahavn. Teir tríggir eru komnir í finaluna saman við Rikke Emmo Nibuhr, 20 ár, Nadia Malm Hansen, 17 ár, og tí 22 ára gomlu Louise Baltzer Jensen.

Nú mangla so einans at finna tveir teir síðstu finalistarnar, ið koma í finaluna via eitt wildcard, ið teir fáa tillutað frá dómararunum í wildcard-umfarinum komandi týskvøld.



FILMSTEIGURIN

# The Muuhvie – Tey óttaleysu



Og soleiðis kann ein ekkaleysur cowboy'ari ríða móti sólsetrinum…Tí nú duga neytini sjálvi rest.

Garðurin hjá Pearl skal á tvang, um so er, at hon ikki megnar at finna 750 dollarar her og nú. Og megnar Pearl ikki hetta, ja, so mugu trúføstu mjólkineyt hennara gera okkurt við málið. Hvørki Maggie, Mrs. Caloway ella Grace vita tó, hvussu hetta skal gerast, men brádliga síggja tær, at vinningurin fyri at fanga neytatjóvin, Alameda Slim júst er 750 dollarar. Hesturin hjá sheriffinum er um at flána, tá hann hoyrir hetta, men hvat! Hvør man duga betri at fanga ein neytatjóv enn akkurát neytini sjálv.

Í The Muuhvie hava djórini á garðinum sjálvi átikið sær leiklutin sum lógarinnar armur í tí garvilla Wild West. Eisini hóast tær fáa úr at gera, tá slímuti Slim kemur upp í leikin.







**Frumsýning – Billettprísur: 55,- kr.**

Fríggjadagin 01.10. kl. 17$^{00}$ Fríggjadagin 01.10. kl. 19$^{00}$
Leygardagin 02.10. kl. 17$^{00}$ Leygardagin 02.10. kl. 19$^{00}$
Sunnudagin 03.10. kl. 16$^{00}$ Sunnudagin 03.10. kl. 18$^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 01.10. kl. 20$^{15}$ Fríggjadagin 01.10. kl. 23$^{15}$
Leygardagin 02.10. kl. 20$^{15}$ Leygardagin 02.10. kl. 23$^{15}$
Sunnudagin 03.10. kl. 19$^{15}$ Sunnudagin 03.10. kl. 22$^{15}$




Fríggjadagin 01.10. kl. 21$^{00}$ Leygardagin 02.10. kl. 21$^{00}$
Sunnudagin 03.10. kl. 20$^{00}$




Fríggjadagin 01.10. kl. 22$^{45}$ Leygardagin 02.10. kl. 22$^{45}$
Sunnudagin 03.10. kl. 21$^{45}$




**Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.**

Fríggjadagin 01.10. kl. 18$^{00}$ Leygardagin 02.10. kl. 18$^{00}$
Sunnudagin 03.10. kl. 17$^{00}$